# Tungir deyðbóltar



Liðskiparin hjá B36, John Petersen, royndi at halda høvdið høgt eftir tapið fyri grannunum, men hann ásannaði, at dagurin ikki hevði verið nakað serligt fyri teirra viðkomandi.

– Eg má siga, at kenslan er eitt sindur løgin. Fyrstu løtuna haldi eg, at vit hava takið, men so fáa teir brádliga eitt mál eftir deyðbólt. Hetta tekur tó ikki mótið frá okkum, men tá teir so skora eitt somikið keðiligt mál til 2-0, haldi eg øll luftin fór úr okkum.

– Í seinna hálvleiki royna vit so at stríða okkum aftur, men tá teir eftir enn ein deyðbólt skora til 3-0, gerst mótbrekkan tung. Eina løtu fáa vit so trýst á, og tá vit minka niður í 3-2, satsa vit alt, og so skora teir bara enn einaferð eftir horna.

– Og at vit soleiðis skulu tapa dystin upp á deyðbóltar, er ikki nóg gott. Har hildu vit annars, at vit vóru sera væl fyri, men Rógvi fekk í øllum førum alt ov nógv pláss í dag.

Og John ásannaði eisini, at tað nú kann gerast tungt hjá B36 at stríða seg fram í oddin.

– Sjálvandi er tað møguligt, og hvør dysturin kann altso geva trý stig. Men tað krevur í øllum førum, at vit fáa fult hvørja ferð komandi dystirnar. So mugu vit bara vóna, at hini fara at missa á vegnum, men tað eru vit so ikki harrar yvir.

**-jm**

B36-HB 2-5 (0-2):

# Klaksvíkingarnir skutu B36 niður

**Eftir stórtapið fyri grannunum úr HB mundu seinastu restirnar av gulltosinum í B36-húsinum falla til jørðina**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Fyrra útgávan av slagnum um høvuðsstaðin gjørdist ongantíð tann stóra leikliga upplivingin, sum tað onkra aðra tið hevur verið. Gaman í var talan um nógv mál, og onkra einstaka løtu eisini um gott spæl, men fyri tað mesta var intensiteturin í uppgeðrini ikki á vanliga støðinum, sammett við flestu lokaluppgerðirnar í undanfarnu árunum.

## Lágur

Tað vóru annars nógvar fortreytir, sum vóru til staðar, fyri at dysturin skuldi gerast ein verulig grannauppgerð, við øllum tí, sum hartil hoyrir. Ikki minst tann sannroynd, at Jákup á Borg nú leikar við HB hevði fingið stórt rúm í miðlunum undan dystinum, og tað í sjálvum sær skuldi helst verið ein motivatiónsfaktorur fyri teir hvítklæddu.

Dysturin byrjaði eisini júst soleiðis, sum allar flestu grannauppgerðirnar í Havn byrja. B36 royndi alt fyri eitt at skapa eitt stórt trýst oman móti HB-málinum, meðan HB hinvegin royndi at halda fast í sínum grundspæli, og við eitt sindur av hepni, so kundi B36 eisini lagt seg á odda. Ikki minst tá fríspark frá Santos varð avrættað í múrinum, men burtur úr ongum kom Símun Eliasen skreiðandi og ruddaði bóltin burtur.

Um hetta mundi var HB annars spakuliga við at koma inn í dystin. Teir fingu betri tak á miðvøllinum, har Kári og Rúni fingu fatur í nógv meira enn Jens Kristian, Niels og Ronnie, og var eisini skjótt sjónligt, at HB við tilgongdini av Jákupi og Heðini hevur fingið nakrar álopssinnaðar kantar, sum vilja nakað. Fleiri ferðir hóttu teir við at koma upp í síðunum, soleiðis at innlegg kundu sendast til luftsterka álopið, og til tíðir var talan nærum um eina 4-2-4 uppstilling.

At hetta gjørdist møguligt, komst eisini av, at B36 tóktist hava gloymt alt um at fáa kantarnar framvið. Nakað sum annars hevur ovurstóran týdning í eini 4-3-3 skipan, har bakkarnir skulu upp at skapa yvirtalsstøður. Eina løtu fyrst i dystinum sást nakað til hetta, tá Arnbjørn kom framvið í vinstru, men tað var ikki meira enn einar tvær ferðir. Og hinu megin var steindeytt. Kanska komst hetta av virðingini, sum teir í B36 høvdu fyri teimum báðum fyrrverandi liðfeløgunum, men við at liggja so djúpt, gav árstalsfelagið í øllum førum hesum báðum optimalar treytir.

## Luftvápnið

Og tað skuldi so eisini vísa seg, at tað var við spæli í síðunum og við luftvápninum í álopinum, at dysturin skuldi avgerast.

Hornasparkið, sum elvdi til fyrsta HB-málið, sýndi sjónliga, hvussu HB ætlaði at hótta B36. Væl vitandi um, at spælið úti í feltinum ikki er sterkasta síðan hjá B36-málverjanum, vóru at kalla øll innlegg send inn í málteigin, og her var Rógvi aloftast hægstur. Tað var hann eisini við málið, og so kundi HB spæla dystin eftir sínum fortreytum. Teir tóku seg eitt vet longur aftur, og so hugsaðu teir annars um at standa rætt, fyri síðani at senda kvik álop niðan í síðunum, tá høvi beyðst.

At teir so eisini fingu eina 100 ára føðingardagsgávu frá Trónduri í B36 málinum, soleiðis at støðan gjørdist 2-0, mundi ikki gera støðuna verri, eins og hetta tóktist taka alla luft úr B36.

## Skrædlið lúrdi

B36 kom seg ongantíð eftir hetta, og í seinna hálvleiki lúrdi vandin fyri einum veruligum skrædli. B36 flutti nógv fólk niðan, uttan at tað av álvara gjørdist vandamikið av teirri orsøk. Heldur gjørdist tað opið aftanfyri, og tá Rógvi enn einaferð stútaði hornaspark tætt undir málinum í kassan, mundi tøgnin vera fullkomin í B36-húsinum.

Fyri triðju ferð í dystinum undirstrikaði hetta eisini, at B36 hevur ein trupulleika á málverjasessinum.



Mynd: Álvur Haraldsen

Hóast Tróndur Vatnhamar so avgjørt eisini hevur sínar styrkir, er tað eingin loyna, at tað var ætlanin hjá felagnum at styrkja seg á hesum sessinum, men Jákup Mikkelsen valdi KÍ framum, og í tveimum umførum vórðu útlendskir málverjar vigaðir og funnir ov léttir.

Ein slíkan trupulleika hevur HB eisini fingið. Boðini um skaðan hjá Bárði Johannesen komu í øllum førum illa við, tí hóast avloysarin, Pól N. Joensen, hevur góð evni, so hevur hann enn ikki sama autoritet, sum Bárður hevur, og hóast hann hesaferð ikki hevði tað stóra at gera, so átti hann sín lut í, at B36 mest sum burtur úr ongum skapti spenning í dystin. Innskifti Jens Erik Rasmussen byrjaði mótálop, og hetta endaði við, at Bárður Mortansson royndi seg við skoti. Tað er einki at taka seg aftur í, at skotið var hart, men tað sat beint við síðuna av málverjanum, og úr 25 metrum eigur ein málverji ikki at lata heta fara framvið, men tað hendi so kortini.

> »*Nógvar yvirskiftir kundu verðið nýttar í sambandi við dagsins dyst. t.d. "Undirhald fyri allar pengarnar" ella "Rógvi á muni" ella "Jákup kom sá og sigraði", tí allar passaðu til høvið*«
>
> HB-heimasíðan undir yvirskriftini »Rógvi brúkti høvdið«

## Framhaldandi passivitetur

Og so satsaði B36 alt. Eina løtu mundi HB vera púra ørkymlað, tá eitt avrættað skot frá Egili á Bø vann fram til ein leysan John Petersen, soleiðis at talvan vísti 3-2.

Óttin um at missa eina annars tryggja leiðslu, mundi breiða seg í HB, men spakuliga funnu teir aftur á beint. B36 lá framvegis við nógvum fólki frammi á vøllinum, men verjuspælið var passivt, og tá Símun Eliasen so skoraði til 4-2, meðan verjan snorksvav, punkteraði dysturin av álvara.

Passivt verjuspæl var eisini høvuðsorsøkin, tá Heðin á Lakjuni setti seinsta seymin í kistuna við gulldreymunum hjá B36. Uttan at nakar verjuspælari hevði hug at trýsta hann, slapp klaksvíkingurin at reka einar 20 metrar, áðrenn hann við kalda høgra beininum royndi seg. Skotið var ikki av teimum harðastu, og tað hevði kós móti nærmasta stólpanum, sum málverjin burdi átt, men sjálvsálitið hjá Vatnhamarmanninum mundi av álvara vera fyri niðurgangandi, soleiðis at hann enn einaferð noyddist at taka bóltin úr meskunum.

## Bara HB heldur kósini

Einki er at ivast í, at sigurin var ein av teimum heilt søtu í HB-húsinum. At hann so eisini bar við sær, at HB nú bert er eitt stig frá oddaplássinum, gjørdi ikki smakkin verri, og sum støðan er nú, so er einki at ivast í, at meistararnir nú av álvara eru í ferð við at endurlansera seg sjálvar sum heitasti FM-biðilin.

Og hóast hetta var fyrsti dysturin við Jákupi á Borg á liðnum, so var tað í løtum sjónligt, at hann kann gerast gull verdur. Ikki minst, um uppstillingin framhaldandi verður sum sunnudagin. Við honum á Heðini í hvør sínum borði kann liðið spæla við slíkari ferð niðaneftir, at mótstøðan ikki kann loyva sær ov langt niðan at trýsta. Serstakliga ikki, tá miðframherjarnir eita Rógvi Jacobsen og Heine Fernandez.

Og so dugir liðið eisini at skapa yvirtalsstøðurnar, tá hetta krevst. Tær ferðirnar, tá uppspælið skuldi byggjast frá grundini, sýndu bæði Hallur Danielsen og Janus M. Joensen gott hegni at koma framvið, og hjá Janusi tykist tað nú bert vera ein spurningur um tíð, áðrenn hann aftur kemur í landsliðshitan, har hann júst hevði vunnið seg, tá hann fyri tveimum árum síðani fekk álvarsligan knæskaða.

Hjá B36 er støðan nú nakað øðrvísi. Undan kappingini varð liðið útrópt sum ein av heilt stóru gullfavorittunum, men eitt stig í trimum dystum hevur líkasum máað støðið undan hesum. Og liðið hevur eisini nakrar eyðsýndar veikleikar. Miðvøllurin riggar framvegis ikki nóg væl, og spurningurin er, hvørja loysn Jóannes Jakobsen næstu ferð fer at royna her. Og teir báðar seinastu dystirnar hevur málverjaspælið verið alt annað enn sannførandi, tó at tað neyvan skal roknast við nakrari útskifting her. Snøgt sagt tí eingi alternativ eru.

## Tað besta

– Tað kundi ikki verið betri.

Orðini eigur Rógvi, eftir at hann fyri fyrstu ferð hevði skotið hat-trick fyri HB. Og við staðfestingini sipar hann sjálvandi til, at tað júst var móti grannunum í einum somikið týdningarmiklum dysti, at hann skuldi gera hat-trickið. Um sjálvan dystin helt Rógvi annars, at teir høvdu gjørt síni ting rætt á vøllinum.

– Vit royna alla tíðina at standa rætt í verjupartinum, og fyri tað mesta haldi eg eisini, at tað eydnast. Eina løtu í seinna hálvleiki gongur tó heilt galið, og teir fáa við tveimum málum skapt spenning í, men tá Símun so ger hatta málið, punktera teir fullkomuliga, sigur altso Rógvi Jacobsen at enda.

> »*Ein forering kann vera óheppin, tvær eru kleyvarskapur, men fýra kunnu snøgt sagt ikki góðtakast*«
>
> B36-heimasíðan eftir dystin

## FAKTA UM DYSTIN

**B36-HB 2-5 (0-2)**
0-1: Rógvi Jacobsen, 14
0-2: Rógvi Jacobsen, 32
0-3: Rógvi Jacobsen, 59
1-3: Bárður Mortansson
2-3: John Petersen
2-4: Símun Eliasen
2-5: Heðin á Lakjuni

**B36:** Tróndur Vatnhamar – Egil á Bø, Jóhannis Joensen, Pól Thorsteinsson, Arnbjørn Danielsen – Niels Joensen, Jens Kristian Hansen (Áki Mørk, 81.), Ronnie Samuelsen (Allan Mørkøre) – Bárður Mortansson, John Petersen, Alex dos Santos (Jens Erik Rasmussen, 69.)

**HB:** Pól N. Joensen – Hallur Danielsen, Vagnur Mohr Mortensen, Símun Eliasen, Janus M. Joensen – Jákup á Borg (Rókur F. Jespersen, 87.), Rúni Nolsøe, Kári Nielsen, Heðin á Lakjuni (Ramus Nolsøe, 84.) – Heine Fernandez, Rógvi Jacobsen
GK: Hallur Danielsen, 90.

**Dómari:** Petur Skarðenni. Tóktist ikki hava sín besta dyst. Hevði ofta lyndi til at blása ov títt í floytuna, og hartiil var í fleiri førum talan um manglandi konsekvens, tá hann hevðist at leikarum fyri hevnisøkum, sum ikki fingu eftirspæl í form av kortum

# Byrjaði væl



Undan dystinum var stórt fokus á leiklutinum hjá Jákupi á Borg, sum fyri fyrstu ferð skuldi spæla dyst í reyð/svørtu HB-troyggjuni. Hetta varð eisini væl og virðiliga lýst av vallarvarparanum, sum eftir at hava sagt nøvnini á øllum hinum HB-leikarunum, beyð Jákupi at vera vælkomnan aftur í Gundadal.

Eftir dystin fingu vit orðið á Jákup, og hann viðgekk eisini, at hann eina løtu hugsaði nakað um hetta.

– Sjálvandi var eg spentur undan dystinum, og at byrja við kendi eg meg eisini troyttari, enn eg vanliga eri.

– So hvørt, sum dysturin leið, so fór hetta tó burtur, og eg haldi so ikki, at tað var nakað, sum nervaði meg stórvegis í dystinum.

Men tú legði so eisini upp til tvey mál móti gamla felagnum hjá tær. Var tað nakað, sum tú hugsaði um í dystinum.

– Ikki akkurát tað, at tað var móti B36. Fyri meg ráddi um at fáa eina góða byrjan í HB, og tað fekk eg so. At tað so júst var ímóti B36, var so ikki tað, sum lá mær fremst í huganum, segði Jákup á Borg at enda.